# Páll Horn 75 ár



23. september fyllir Páll Horn í Havn 75 ár. Páll Horn var borin í heim 23. september 1931 í Haldórsvík. Foreldur hansara vóru Óli og Johanna Horn, og saman høvdu tey 5 børn. Tá ið Páll var 6 ára gamal, gjørdu foreldrini av at flyta til Vágs. Johanna, mamma Páll var ættað úr Vági.

Í Vági byrjaði Páll skúlagongd sína. Her gekk hann í 9 ár, harav tvey ár í realskúla. Í 1946, tá ið Páll gjørdist 15 ára gamal, fór hann sín fyrsta túr við St. Jacques, sum pápi hannsara Óli Horn førdi. Longu tá var hugurin at sigla ógvuliga stórur. Honum dámdi væl á sjónum, og hann visti longu tá, at hetta fór at gerast hansara yrki.

Hann sigldi ikki bara í Føroyum, men kring allan heimin. Hann bæði sá og upplivdi heimin, sum tey flestu, aldrin fáa møguleikan fyri.

Eftir seinna veraldarbardaga, um heystið í 1947, gjørdi hann av at fara niður á sjómansskúla í Svendborg. Her høvdu nógvir føroyingar gingið. Sjálva skúlagongdina og skúlan í Svendborg dámdi honum ógvuliga væl. Hugurin, ið ikki altíð hevði verið til staðar, tá ið hann sæt í skúlastovuni í Vági, var nú heilt góður, og gjørdist betur fyri hvønn dag.

Skúlagongdin í Svendborg var sett at vera 5 mánaðir. Skúlin byrjaði 1. novembur og endaði 1. mars 1948. Meðan hann var niðri á skúla, fekk hann hugin at sleppa umborð á eitt skúlaskip. Hann søkti um at sleppa við skúlaskipinum Georg Stage. Svarið frá skúlaskipinum kom ikki fyrr enn hálvan juni, og meðan hann bíðaði eftir svari, sigldi hann við eini skonnart úr Turø.

Hann fekk so játtað, at hann slapp við. Hann skuldi møta umborð á skúlaskipinum Georg Stage í Keypmannahavn. Teir sigldu í donskum sjógvi, frá Kristiansø til Aalborg og upp móti norsku strondini. Tá hetta tíðarskeiðið var av, í oktober mánaði, riggaðu teir av, tóku seglini og raðirnar niður fyri síðstu ferð. Hetta var, meðan teir lógu í Holmenskanal í Keypmannahavn. Eftir hetta gjørdi hann av at fara heim aftur til Føroya.

Áðrenn hann fór úr Danmark, gjørdi hann av, at søkja um at sleppa við skúlaskipinum Danmark. Hann var so heima allan veturin og róði út í Vági og gjørdi annað arbeiði. Í mars mánaði, í 1949, fór hann á suðurlandið við skútuni St. Jacques, sum pápi hansara førdi. Tá ið teir komu aftur til Føroya í mai mánaði, hevði hann fingið bræv úr Danmark, har hann fekk játtað, at hann slapp við skúlaskipinum. Hettar var ein ógvuliga góð og minnisrík tíð í hannsara lívi.

Seint um heystið í 1952, gjørdi Páll av at fara á skiparaskúla. Hetta sama árið andaðist pápi hansara Óli. Í 1953 fór hann sín fyrsta túr sum skipari á St. Jacques, bert 21 ára gamal, og førdi hann til 1960, tá ið línubátarnir byrjaðu at koma til landið.

Í 1960 keypti hann línubátin Óla Horn saman við partafelagnum Th. J. Villem, men hvørt summar líka til 1967, sigldi hann sum skipari við St. Jacques, og førdi hann á sildaveiðu norðanfyri Føroyar. Hetta sama árið var Óla Horn seldur til Noregs. Páll førdi síðani Tumas Við Kráir, sum hann og aðrir keyptu í 1970. Tá fekk hann navnið Gracie, og Páll førdi hann til ídnaðarfiskiskap í Norðsjónum til 1976.

Eftir tíðina við St. Jacques og royndirnar við egnum línibáti, fekk Páll kjans við nýbygda rækjutrolarinum, Fame, hjá John Dam, sum dekkari at byrja við, men bleiv seinni stýrimaður og eitt skifti var hann eisini skipari.

Eftir øll hesi árini á sjónum, ger Páll av at halda uppat við at sigla. Hann hevði tænt fyri seg á sjónum og vildi nú heim til konuna at vera. Lívið vekk frá konu, børnunum og familju hevði ikki altíð verið líka lætt, oftani var stutt millum túrarnar, kanska bert ein til tveir dagar.

Pàll er giftur við Elsu Horn fyrrv. sjúkrasystur úr Havn og saman eiga tey 4 børn. Guðrun, Olgu, Óla og Turið, sum øll búgva í Havn. Páll eigur 11 abbabørn.

Tað er altíð so hugnaligt at vitja ommu og abba, tí abbi altíð eigur ís ella annað gott at geva okkum.

Hóast Páll er farin um pensiónsaldur, er hann framvegis virkin. Honum dámar væl at ganga túrar oman á Vestaru Bryggju, har egnir hann eisini onkran stampin. Um kvøldarnar situr hann við telduni, har hann rør út á alnótini. So ein virkin maður kunnu vit siga. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum og ynskja tær nógv góð ár framyvur góði abbi.

**P.**

# Tøkk



Eina hjartans tøkk vil eg veita øllum tykkum, sum mintust til mín á 100 ára føðingardegnum tann 11. september.

Tøkk til starvsfólkini á Ellisheiminum og til prest, David Johannesen, at tey gjørdu dagin so hugnaligan. Eisini tøkk til Miðvágs Kommunu, sum gjørdi tað møguligt at hátíðarhalda dagin.
Tøkk til løgmann, landsins umboð og ríkisumboðsmannin, sum góvu sær stundir at koma vestur at heiðra meg.

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, sum komu at heilsa uppá meg, tað gleddi meg nógv, ikki minst tykkum, sum komu úr Danmark og Afrika.
Takk fyri sang, blómur og gávur, heilsanir og uppringingar.
Gud signi tykkum øll.

**Kærar heilsur**
**Alma Frederiksen,**
**Miðvágur**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og bróðir okkara

**Peter Jacobsen**

*vanliga nevndur Peter hjá Jákup Hans*
úr Tórshavn

andaðist á Lágargarði hósdagin 21. september, 84 ára gamal.
Bønarhald verður á Lágargarði leygardagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 14.

*Vegna familjuna*
**Mathilda**

---

†

**Josefina Maria Højgaard**

á Toftum

andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi hósdagin 21. september, 73 ára gomul.
Kistan fer av røktarheiminum í Runavík sunnudagin kl. 15.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni mánadagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Eskild og børnini við familju**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Andrias R. E. Jensen**

Sørvágur

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til øll tykkum, sum vóru um hann ta seinastu tíðina og hjálptu til í samband við jarðarferðina og við ervinum.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, berarar, sangarar og gravarar.
Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til Sørvágs kirkju og hjartaliga tøkk til øll tykkum sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Sanntrina Jensen**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Edvard Høghamar, á Eiði**, vanliga nevndur Hans í Fjósinum, fer til gravar úr Eiðis kirkju leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Hans, kunnu lata eina peningagávu til Eiðis kirkju, konta í peningastovnunum. fríggjadagur,

**Peter Jacobsen**, vanliga nevndur **Peter hjá Jákup Hans úr Tórshavn**, andaðist á Lágargarði hósdagin 21 september, 84 ára gamal. Bønarhald verður á Lágargarði leygardagin kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 14.00.

**Hans Edvard Høghamar, á Eiði**, vanliga nevndur Hans í Fjósinum, andaðist í heiminum 20. september, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju leygardagin klokkan 14.